



# eg arbeiði

frá hesum. Og soleiðis fingu fólk at vita at vit vóru til.

- Jú, hetta gjørdi sera góðan mun, sigur Elisabeth.

Eftirspurningurin vaks, og tey høvdu trupult at nøkta henda við bert einum einstøkum ovni. Nú er so ein ovnur komin aftrat.

> **Okkurt tíðarskeið vóru vit simpelthen noydd at arbeiða í døgndrift**

### Ikki ein belastningur

Uppi á Grind á Eiði halda verkstaðurin og framsýningin til, og er hann opin ávísar tíðir ella eftir avtalu.

Tað er tó serliga um summarið at fólk vitja her. Tá er nærum gerandissjón hjá eiðisfólki at onkur bussur stendur Uppi á Grind, har fólk í hópatali vitja inni í Glarlist og hyggja seg um og keyps føroyska glarlist.

Annars ber til at keypa vørur frá Glarlist á ymsum støðum kring landið. Sigast kann, at glarvørurnar av Eiði er væl umtóktar millum manna.

Fyrsta árið, tey høvdu opið royndist væl og annað árið uppaftur betri. Hóast sølan dalaði nakað í fjør, er Elisabeth kortini væl nøgd við úrslitið og arbeiðsgongdina.

- Vit ynskja at hava søluna á einum hóskandi støði, soleiðis at arbeiðið ikki gerst ein belastningur fyri okkum, sigur Elisabeth sum er farin um tey sjeyti árini.

Serliga nógv er at gera um summarið, men tað vísir seg at longu í apríl mánaði byrja tey fyrstu ferðafólkini at koma. Ofta vitja ferðafólk eisini, tá tað fer at líða til 1. september.

- Tá er ikki hugsingur um at fara í summarfrí. Hana taka vit vanliga í november og desember mánaði, sigur Elisabeth.



### Nýggj framleiðsla

Ein so virkin kvinna sum Elisabeth ynskir alla tíðina at hava okkurt nýtt at bjóða fram til kundarnar. Tí ger hon eisini nógv av at fara á skeið fyri at fáa íblástur til arbeiðið.

Umframt skeiðini og undirvísingina, sum er nevnd aðrastaðni á síðuni, hevur Elisabeth eisini verið á íbirtaraskeið fyri kvinnur, sum ætlaðu sær undir eitthvørt vinnuligt virksemi.

Seinni í hesum mánaðinum skal hon aftur á skeið, hesa ferð í gerð av smúkkum.

- Eg havi ein ovn at gera smúkkur við. Og fólk eru eisini so smátt farin at spyrja eftir smúkkum.

- So nú ynski eg at fáa meiri at vita um hetta, sigur Elisabeth.

Smúkkuovnurin er langt síðani fingin í hús. Nú bíða vit bara spent eftir, nær føroyskar smúkkur av Eiði verða at síggja í handlinum!

## - Ikki sita fyri einki

Elisabeth og maðurin, Páll høvdu búð í Danmark meginpartin av lívi teirra, og vóru so smátt farin at nærkast eftirlønaraldri. Spurningurin kom tá upp teirra millum: Hvat skulu vit gera, tá vit fara frá fyri aldur?

Elisabeth sjálv var útlærd sum sjúkrasystir, og hevði í sínum arbeiði arbeitt innan mong ymisk øki - m.a. heimarøktina, psykiatri'ina, eins og hon hevði verið leiðari á einum røktarheimi.

Í øllum arbeiðum sínum hevði Elisabeth sæð tann eina møguleikan sum eldri fólk høvdu fyri at forfella, um tey bert sótu óvirkin og trilladu tumlarnar heima ella á stovni. Sum sjúkrasystir visti hon hinvegin, at fingu tey okkurt munagott at takast við, kundi lívsdygd teirra bæði bøtast og varðveitast í langa tíð.

- Vit ynsktu sjálvi at gerast gomul í Føroyum, men vit vildu ikki bara sita fyri einki. Vit vildu hava okkurt munagott at gera, greiðir Elisabeth frá. Avgerðin varð seinni tikin um at flyta heim til Føroyar at fremja eina av ætlanum teirra.

### Spennandi ítriv

Elisabeth var byrjað nøkur ár frammanundan at arbeiða við glasi. Hetta arbeiðið hugtók hana so nógv at hon so líðandi minkaði um arbeiðstíð sína, fyri at kasta seg út yvir hetta spennandi ítrivið.

Árini frá 1990 og frameftir fekk hon undirvísing í, hvussu ein teknar, málar og ger grafikk hjá myndahøggaranum og listamálaranum Pierre Gaborit.

Tey seinastu 10 árini hevur hon so arbeitt við ovnforming, máling og sandstoyping í glasi við frálæru hon fekk frá glarlistakvinnuni, Else Willumsgaard.

Ja, Elisabeth fekk ikki bert undirvísing og varð undirvíst, hon hevði eisini ein hóp av framsýningum á stovnum og í listafeløgum í Danmark.

Men í 2001 var tíðin komin til at fullføra dreymin um at lata upp egnan verkstað í Føroyum. Og hetta eydnaðist henni at fremja í november mánaði 2002, tá Glarlist lat upp á Eiði.